INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

**Løgtingið**

8. februar 2011
Mál: 7005-007/08
Tygara skriv:
Viðgjørt:

**Løgtingsmál nr. /2010: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um einkarætt til at byggja, reka og fíggja undirsjóvartunnil undir Skálafjørð og Tangafjørð**

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um einkarætt til at byggja, reka og fíggja undirsjóvartunnil undir Skálafjørð og Tangafjørð**

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 53 frá 26. mai 2010 um einkarætt til at byggja, reka og fíggja undirsjóvartunnil undir Skálafjørð og Tangafjørð verða gjørdar hesar broytingar:

**1)** Í § 2, stk. 2 verður "1. desember 2010" broytt til "1. oktober 2011"

**2)** Í § 2 stk, 3 verður "áðrenn 1. november 2010" broytt til "í seinasta lagi 1. oktober 2011"

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## Kap. 1. Almennar viðmerkingar

*1. Orsøkin til lógaruppskotið*

Í samgonguskjalinum millum landsstýrisflokkarnar verða fimm tær tyngstu íløgurnar fyri samfelagið nevndar undir yvirskrivtini Samfelagsíløgur. Ein av hesum er Skálafjarðartunnilin, og sagt verður víðari: "Farið verður undir samráðingar við privata felagið um gerð av Skálafjarðartunlinum".

Við støði í samgonguskjalinum hava samráðingar verið millum privata felagið P/F Skálafjarðartunnilin og Innlendismálaráðið við atliti at eini avtalu.

Tá Eik samtakið kom í trupulleikar boðaði P/F Skálafjarðartunnilin Innlendismálaráðnum frá, at felagið fyribils steðgaði arbeiðinum við tunnilsverkætlanini, tí Eik grunnurin átti 50% av partapeninginum í P/F Skálafjarðartunlinum. Í dag eigur Eik banki Føroya hesi partabrøv, og sostatt er ikki longur óvissa um ognarviðurskiftini. At Eik samtakið fekk truplleikar við at halda sínar skyldur, og tískil ikki var ført fyri at halda fram, má sigast at vera serlig viðurskifti, og sum geva orsøk til lógarbroytingina, sum er skotin upp.  Í sambandi við ognarviðurskifti og Føroya Lívstrygging hevur stjórin í Føroya Lívstrygging boðað frá, at viðvíkjandi tunnilsverkætlanini verður eingin broyting, tá landið selir ½ av Føroya Lívstrygging.

Landsstýrismaðurin hevði eftir lógini heimild til 1. desember 2010 at lata P/F Skálafjarðartunlinum einkarætt at gera tunnilssambandið. Sostatt hevur landsstýrismaðurin ikki longur hesa heimild.

*2. Endamálið við uppskotinum*

Til tess at landsstýrismaðurin kann hava heimild at lata P/F Skálafjarðartunlinum einkarættin er neyðugt, at lógin verður broytt.

Tá arbeiðið við tunnlisverkætlanini steðgaði í september 2010, var felagið á veg út á altjóða kapitalmarknaðir at útvega sær fígging. Felagið hevur funnið sær ráðgevar bæði at hjálpa sær at finna íleggjarar til eginfíggingina og lánveitarar til fremmandafíggingina.

Innlendismálaráðið og P/F Skálafjarðartunnilin eru samd um eitt uppskot til avtalu, og meta tað egnað sum grundarlag til at útvega sær fígging á. Tað skal tó roynast á marknaðinum.  Av tí at felagið ikki náddi at taka ítøkiligt samband við fíggjarveitararnar vita felagið og Innlendismálaráðið ikki, um neyðugt verður at gera broytingar í avtaluni, og um neyðugt verður við fleiri samráðingur í tí sambandinum.

Tað kann koma at taka nakað av tíð, men mett verður, at ½ ár frá tí at uppskotið er samtykt, er ríkilig tíð at gera endalilga avtalu. Tí er skotið upp, at geva landsstýrismanninum heimild til 1. oktober 2011 at lata P/F Skálafjarðartunlinum tíðaravmarkaða einkarættin.

Eitt annað endamál við uppskotinum er, at um Løgtingið samtykkir tað, so ger felagið sínar kanningar lidnar. Harvið kannar felagið – ikki bara fyri seg sjálvt men eisini fyri landið – um tað letur seg gera at fremja ætlanina. Men tað er felagið, ið ber kostnaðin av kanningunum.

*3. Galdandi lóg og atfinningar*

Løgtingið samtykti 12. mai 2010 løgtingslóg nr. 53 frá 26. mai 2010 um einkarætt til at

byggja, reka og fíggja undirsjóvartunnil undir Skálafjørð og Tangafjørð. Løgingslógaruppskotið varð evnað til í semju við P/F Skálafjarðartunnilin.

Hesum lógaruppskoti viðkomandi er

> § 2. Landsstýrismanninum verður heimilað at lata P/F Skálafjarðartunlinum ein tíðaravmarkaðan einkarætt til fyri egna rokning og váða at byggja, reka og fíggja ein undirsjóvartunnil undir Skálafjørð og Tangafjørð. Tunnilin skal knýta Suðurstreymoy saman við suður Eysturoy.
>
> Stk. 2. Einkarætturin skal verða latin P/F Skálafjarðartunlinum í seinasta lagi tann 1. desember 2010.
>
> Stk. 3. Um landsstýrismaðurin ikki nýtir heimildina at geva P/F Skálafjarðartunlinum einkarættin áðrenn tann 1. november 2010, fellur heimildin burtur, uttan so at landsstýrismaðurin í staðin ger av at bjóða út einkarættin í fríari kapping, við tí endamáli at geva øðrum einkarættin. Um so er, verður landsstýrismanninum heimilað at gera ein sáttmála um einkarætt við tann, sum út frá einari samlaðari meting má metast at hava givið besta tilboðið.

Lógin hevur, eftir at hon bleiv samtykt, verið fyri atfinningum. Spurningar eru settir við trygdina yvirhøvur í ætlaða tunlinum. Innlendismálaráðið viðgerð spurningin, og til kunnleika verður hjálagt skriv til Innlendismálaráðið dagf. 07.12. 2010, viðmerkingar hjá Landsverki dagf. 13.12.2010 og upprit um trygdina dagf 07.02.2011.

Tunnilsætlanin sum heild hevur eisini verið fyri atfinningum. Í tí sambandinum er ein alternativa ætlan løgd fram fyri Innlendismálaráðið um eina øðrvísi farleið. Ætlanin dagf. 16.07.2010 er hjáløgd til kunnleika.

*4. Nýskipan við uppskotinum*

Einasta nýggja í hesum lógaruppskotinum er, at P/F Skálafjarðartunnilin fær ein møguleika afturat, sum tað ikki hevur í galdandi lóg. Um Løgtingið ikki samtykkir uppskotið, er verandi lóg framhaldandi galdandi. Tað merkir at landsstýrismaðurin kann gera av at bjóða einkarættin út í fría kapping.

*5. Hvør hevur ummælt uppskotið og innkomnar hoyringsviðmerkingar*

## Kap. 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

*1. Fíggjarligu avleiðingarnar fyri land og kommunur*

Uppskotið hevur ikki fíggjarligar avleiðingar fyri landið, tí felagið sum fær konsessiónina, skal sambært konsessiónini, binda seg til at endurrinda allar útreiðslur, sum innlendismálaráðið hevur í sambandi við tað løgfrøðiligu, fíggjarligu og teknisku ráðgeving, sum er neyðugt fyri at kunna enda samráðingarnar við P/f Skálafjarðartunilin.

Í fyrsta umfari verður mett neyðugt at fáa til vega eykajáttan uppá umleið 1,0 mió kr. til framhaldandi fyrireikingar.

Uppskotið verður ikki mett til at hava fíggjarligar avleiðingar fyri kommunur.

*2. Mettar umsitingarligar avleiðingarnar fyri land og kommunur*

Uppskotið verður ikki mett at hava fyrisitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

*3. Fíggjarligu avleiðingarnar fyri vinnuna*

Uppskotið verður mett at hava jaligar avleiðingar fyri vinnulívið við tað at byggingin væntandi kemur fyrri í gongd við at gera avtaluna við P/F Skálafjarðartunnilin enn við eini útbjóðingartilgongd. Haraftuat hevur P/F Skálafjarðartunnilin longu nú brúkt væl av peningi til fyrireikingar, sum felagið kann fáa nyttu av. Uppskotið verður ikki mett at hava fyrisitingarligar avleiðingar fyri vinnulívið.

*4. Avleiðingar fyri umhvørvið*

Uppskotið verður ikki mett at hava avleiðingar fyri umhvørvið

*5. Serligar fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum*

Uppskotið verður ikki mett at hava serligar fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

*6. Sosialar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir*

Uppskotið verður ikki mett at hava sosialar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

*7. Um millumtjóða sáttmálar hava við sær fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri landsmyndugleikar, kommunumyndugleikar, ávís øki í landinum, ávísar samfelagsbólkar ella vinnununa*

Uppskotið verður ikki mett at hava fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur.

*8. Um uppskotið áleggur fólki skyldur t.d. upplýsingarskyldu, skrásetingarskyldu ella t.d. krøv um loyvi*

Uppskotið verður ikki mett at áleggja fólki skyldur ella hava fyrisitingarligar avleiðingar við sær fyri vanliga borgaran.

*9.Um heimildir verða lagdar til annan landsstýrismann, ella til kommunur útyvir kommunustýrislógina*

Sambært uppskotinum verða heimildir ikki latnar til annan landsstýrismann, ella kommunur.

| | Fyri landið /landsmyndugleikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar samfelagsbólkar /felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar /búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða reglur og avtalur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | | Nei | |

**Kap. 3. Serligar viðmerkingar**

**Til § 1**

**1)** Verandi lóg gav landsstýrismanninum heimild til at lata P/F Skálafjarðartunlinum einkarætt til fyri egna rokning og váða at byggja, reka og fíggja ein undirsjóvartunnil undir Skálafjørð og Tangafjørð soleiðis, at einkarætturin skuldi verða latin felagnum í seinasta lagi 1. desember 2010.

Orsaka av at Eik samtakið í september 2010 ikki longur megnaði at halda sínar skyldur, steðgaði P/F Skálafjarðartunnilin arbeiðinum at fyrireika verkætlanina. Eik grunnurin átti 50% av partapeninginum.

Við at broyta §2, stk. 2 í lógini soleiðis, at einkarætturin skal verða latin P/F Skálafjarðartunlinum í seinasta lagi 1. oktober 2011 fær felagið nóg góða tíð at gera fyrireikingararbeiðið liðugt. Við støði í tí kunnu bæði felagið og Innlendismálaráðið taka støðu til, um avtala um einkarættin kann undirskrivast.

**2)** Broytingin í § 2, stk. 3 í lógini er ein avleiðing av at tíðarfestingin í stk. 2 verður broytt. At broyta orðingina frá "áðrenn" til "í seinasta lagi" ger, at sama orðing kemur at standa í báðum stykkjunum.

**Til § 2**

Áseting um gildiskomu.

Innlendismálaráðið, . februar 2011

**Annika Olsen**
landsstýriskvinna

/ Rúni Joensen

<u>Hjáløgd skjøl</u>
Skriv til Innlendismálaráðið dagfest 07.12.2010
Viðmerkingar hjá Landsverki dagfestar 16.12.2010
Notat om sikkerhedsforhold i Skálafjarðartunnelen, dagfest 07.02.2011
Alternativ ætlan, dagfest 16. juli 2010